# Todi umhugsar støðuna

**Eingin í FCK hevur lagt nakað trýst á landsliðsframherjan, men nógvu skaðarnir á landsliðsferðunum tykjast hava givð Toda nakað at hugsa um**



*Í FCK vóru tey sera hørm um, at Todi enn eina ferð kom skaddur heim av landsliðsferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LANDSLIÐ
Jákup Mørk

Tað tykist bara vera ein sannroynd, at tá Todi Jónsson fær ein skaða at dragast við, so er hesin altíð á onkran hátt knýttur at landsliðnum.

Seinasta dømi um hetta fingu vit, tá hann í dystinum móti Luksemburg noyddist skaddur av vøllinum, og hetta var so avgjørt ikki nakað, sum hóvaði leiðsluni í felagnum.

Í donsku bløðunum varð Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri, endurgivin fyri at siga, at tað kundi ikki vera rætt, at Todi líktist einum, sum hevði verið í grindadrápi, hvørja ferð hann kom aftur av landsliðsferð.

Hóast hørðu orðini, so heldur Todi tó ikki, at nakað persónligt liggur í hesum.

– Nei, hann hevur helst verið rættiliga irriteraður, og tað er kanska eisini skiljandi. Tað var jú ikki soleiðis, at eg á nakran hátt varð skeldaður. Sjálvandi vóru teir harmir um skaðan, men teir kunnu jú ikki gera annað enn at seta meg ígongd við at venja meg uppaftur.

### Umhugsar landsliðið

Nógvu skaðarnir á landsliðsferðunum hava sjálvandi ávirkað tað arbeiðið, sum Todi hevur kunna gjørt fyri felagið. Enn hevur eingin í FCK verið í holt við FSF, soleiðis at Todi kann fáa frí frá landsliðnum, og Todi roknar heldur ikki við, at hetta verður aktuelt. Hinvegin tykist hann sjálvur at hugsa eitt sindur, hvørt tað kanska hevði verið rættari, um hann ikki spældi á landsliðnum.

– Eg havi onga avgerð tikið um tað enn, men tað er klárt, at mann fer at hugsa eitt sindur, tá skaðarnir konstant raka so óheppið. Tað er eingin í FCK, sum hevur lagt nakað trýst á meg í so máta, men hinvegin er tað jú her, at eg havi mítt arbeiði.

– Landsdystirnir her fyri hava eisini sýnt, at avloysararnir eru klárir, men sum sagt, so havi eg ikki tikið nakra avgerð enn. Eg havi so í øllum førum tveir mánaðir til at umhugsa støðuna, sigur Todi Jónsson at enda.

# Bara undanvindur í Vági

**Nýggja liðið í bestu deildini megnaði einki at gera við meistararnar, sum avgjørdu, tá teir høvdu nógva vindin undan**

Føroyameistararnir í Vági høvdu sunnudagin vitjan av nýggja liðnum í 1. deild, EB/Streymi. FM vinnararnir vunnu 4–1. Teir vóru frammanfyri 3–0, tá 1. hálvleikur var liðugur, og so var tað bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin fór at verða.

Líkindini vóru so mikið vánalig, at tað kanska hevði komið upp á tal at útseta, um talan hevði verið um uppgerð á fastlandinum.

VB hevði undanvind í 1. hálvleiki, og tað mesta gekk fyri seg á mótstøðuhálvuni. Gestirnir vóru í sera verjukendari útgangsstøðu. Bergur Magnussen hevði fýra menn í verjuni, ein í álopinum og fimm á miðvøllinum. Gunnar á Steig, fyrrverandi KÍ málverjin, var millum stólparnar, og hann hevði fleiri góðar bjargingar.

Robert Cieslewicz setti hol á. Uppspælið var ikki ókent. Sum so mangan í fjør, so var tað spælandi venjarin, Krzystof Popczynski, sum streyk ígjøgnum í vinstru, legði skrátt út frá, og so setti hin pólverjin í álopinum fótin á.

Palli Augustinussen skoraði hini bæði málini í 1. hálvleiki. Fyrst varð hann spældur púra leysur í brotsteiginum og sendi bóltin framvið málverjanum, tá hesin var á veg út, og so stútaði hann hornasparksinnlegg úr vinstru í kassan.

### Vindurin burtur

Eftir steðgin hevði EB/Streymur undanvind, men ólukktíð fyri teir, so var tað heilt skjótt, at tað bleiv stilli. Tað luktaði kanska eitt sindur av spenningi, tá Jón Sigurd Gleðisheygg fýra minuttir eftir hvíldina eftir aftur og fram støðu skoraði til 3–1. Men tað kom ongantíð spenningur í, og Marek staðfesti sigurin, eftir fleiri ferðir eitt tvey samanspæl við miðvallar felagan, Tórða Holm.

Á heimaliðnum var kent fólk. Umframt Marek var – sammett við meistarraárið í fjør – ein nýggjur maður, nevniliga Gisli Sveinbjørnsson. VB liðið sá soleiðis út: Bjarni Johansen – Marner Richard, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Jón Gærdbo, Tórður Holm, Gisli Sveinbjørnsson – Robert Cieslewicz, Krzystof Popczynski.

Á liðnum hjá EB/Streymi vóru teir heilt fáir, sum høvdu royndir úr bestu deildini. Umframt fyrrverandi KÍ málverjan var ein nýggjur fremmandur maður, nevniliga Sigfríður Abrahamsen, sum onkuntíð var á ÍF liðnum í 1. deild í fyrraárið. Liðið sá soleiðis út: Gunnar á Steig – Sigfríður Abrahamsen, Ólavur Poulsen, Knút Vesturtún, Alfred Jacobsen – Tummas Joensen, Jón Sigurd Gleðisheygg, Vinjard Joensen, Jóhan á Stongunum, Kaj Joensen – Hallur Jacobsen.

**jh**

# Fuglfirðingar eru drúgvir

**Men fyri aðru ferð noyddust teir at lata sær tepurt tap lynda ímóti liði úr bestu deildini**

Fyri aðru ferð endaði ÍF á heimavølli undir í stríði við lið úr bestu deildini. Fyri fjúrtan døgum síðani var neyðugt orsaka av kava at flyta dystin úr Fuglafirði og til Gøtu. B68 vann 2–1, og ta ferðina breyt ÍF málverjin, Rúni Joensen, beinið.

Leygardagin varð spælt í Fuglafirði, og nýggi ÍF málverjin var sera eyðsýndur ímóti KÍ. Ken Bærentsen hevur gott hegni og fínt bólteyga, men hann hevur fyri tað mesta verið úti á vøllinum. Í málmans neyðini hevur Pauli Jarnskor sett veteranin millum stólparnar, og Ken var sera sannførandi. Eisini tí hann megnaði so væl at lesa spælið og harvið tók broddin av støðum, sum vóru um reppið at gerast vandamiklar.

Spælið var beinleiðis, uttan ov nógv pilkarí, og tað vóru nógvar spentar støður frammanfyri bæði málini. Tað kom bara eitt mál. Tað fekk KÍ. Tomislav Sivic legði í 62. minutti innfyri úr høgru. Bólturin sigldi til handara stólpan, har Ove Nysted við høvdinum stýrdi honum í handara síðunetið.

Longu í 1. hálvleiki hevði KÍ liðformaðurin, Allan Joensen, ein fínan møguleika, tá tað varð spælt út frá baklinjuni og aftur til brotssparks blettin, men innaru síðu royndin fór í krovið á ÍF málverjanum. Hjalgrím Elttør var einar tvær ella tríggjar ferðir leysur við ÍF málverjanum, men heldur ikki hann megnaði at fáa mál.

ÍF kendi heldur ikki sína vitjunartíð. Høgni á Lakjuni hevði størstu møguleikarnar. Aðru ferðina bjargaði Karstin Joensen í KÍ málinum, tá Høgni var púra leysur, og seinnu ferðina var upplagt, at tað skuldi havt verið mál. KÍ málverjin var óheppin og gleið, men kortini var ÍF álopsmaðurin óheppin, tá hann stýrdi bóltinum í stólpan og ikki í púra opna málið.

Eyðolvur R. Petersen var eyðsýndur í uppspælinum hjá ÍF, og Mortan Thomsen kom fleiri ferðir ígjøgnum í vinstru síðu.

Á ÍF liðnum vóru Ken Bærentsen – Torstein Joensen, Áki Petersen, Tomek Przybilski – Árni R. Petersen, Eyðolvur Petersen, Roy Róin, Mortan Thomsen – Høgni á Lakjuni, Heini Heinason, Eyðun Rygshamar.

Í 2. hálvleiki komu Bárður á Lakjuni og Hanus Eliasen á vøllin ávikavíst fyri Eyðun Rygshamar og Høgna á Lakjuni.

KÍ liðið sá soleiðis út: Karstin Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Fríðin Ziskason – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Allan Joensen, Símun Joensen – Hjalgrím Elttør, Tomislav Sivic, Ove Nysted.

Einasta útskiftingin hjá klaksvíkingum var, tá Eyðun Klakstein loysti Allan Joensen av.

**jh**



# Herfølge kendi tað sum sigur

**Í AB vóru teir vónbrotnir um málleysa javnleikin, meðan teir róptu hurrá í umklæðingarrúminum hjá Jákupi Mikkelsen og teimum**

Málleyst, nógv órudduligt spæl og sjey gul kort. Donsku fjølmiðlarnir hildu ikki, at tað var nakað at reypa av, sum hevði verið at sæð í Gladsaxe seinnapartin sunnudagin. Har hevði Herfølge vitjað og stríðst fyri lívinum ímóti AB, sum eisini er illa spert í bortnstríðnum av superliguni.

Í AB umklæðingarrúminum vóru teir ikki í góðum lagi eftir loki stríð. Tað tóktist sum um teir hildu seg hava mist tvey stig í staðin fyri at hava vunnið eitt.

Í Herfølge umklæðingarrúminum var lagið gott. Har róptu teir hurra, tí teir høvdu vunnið eitt stig. Jákup Mikkelsen hevði í fyrsta dystinum eftir landsliðsferðina í Luksemburg og Russlandi megnað at halda tætt. Hann varð ikki settur á nógvar stórar royndir, men tá teir úr brotsteiginum heilfluktaði móti málinum, var hann á rætta plássinum og helt bóltinum.

### Avgerandi

John Faxe Jensen, Herfølge venjarin, hevði sett seg sjálvan á miðvøllin, og hann var ovurfegin fyri javnleikin. Hóast Herfølge framvegis er tvey stig niðanfyri AB í kappingini fyri at sleppa undan niðurflytingarplássinum, so bendi lagið eftir dystin á, at tað er Herfølge og ikki AB, sum hevur sinniliga yvirskotið.

– Dysturin var sera týdningarmikil fyri okkum. Vit hava bara hugsað um túrin til Gladsaxe. Nú fara vit at hugsa um og fyrireika okkum til næsta dystin, staðfesti John Faxe Jensen. Hóast liðið hjá honum er evni til niðurflyting, so verður hildið, at eingin venjari í superliguni situr tryggari í stólinum, enn venjarin hjá Herfølge ger tað. Fyri ikki so langari tíð síðani varð sáttmálaskeiðið longt, soleiðis at tað er galdandi trý ár afturat.

Næsti dysturin, sum Faxe sipaði til, er tann komandi sunnudag. Tá fær Herfølge vitjan av botnproppinum úr Haderslev. Hetta liðið kallast nú HFK Sønderjylland.

Suðurjydarnir høvdu sunnudagin vitjan av FC Midtjylland, sum fór til hús aftur við 3–2 sigri.

### AGF liggur tungt

Mest umrødda avrikið í Danmark sunnudagin var tað hjá AGF. Teir taptu 5–1 í Aalborg. At siga at tað varð tosað um avrikið hjá AGF, er ikki rætt. Tað varð heldur tosað um, at AGF var púra máttleyst.

Fyri Herfølge og teirra møguleikar fyri framtíðar luttøku í superliguni, hava úrslitini hjá AGF áhuga. At AGF tóktist tørva stórt sjálvsálit, og at spælararnir ikki tóktust vera uppsettir, halda danskir fjølmiðlar komast av, at tað stendur heilt illa til fíggjarliga í stóra felagnum í Århus. Leygardagin megnaðu teir akkurát at sleppa undan húsagangi, tá teir í evstu løtu kláraðu at skava eina millión saman.

### Eingin Johan

Tað hevur í vár ikki ligið serliga væl fyri hjá Johan B. Hansen, føroyska landsliðsmanninum í OB. Hann hevur ikki megnað at vunnið sær fast pláss ímillum teir fyrstu ellivu á liðnum hjá OB, og mikudagin mundi tað kennast snópið og sum eitt vónbrot, at Allan Simonsen heldur valdi Pól Thorsteinsson til miðverjupláss enn OB manninn.



*Jákup hevur ikki at smílast at í løtuni*

OB hevði sunnudagin vitjan av Lyngby. Úrslitið var 1–1, og tað halda teir í Lyngby, at teir hava alla orsøk at vera væl nøgdir við.

Venjarin og onkrir av spælarunum hjá Lyngby søgdu seg troysta seg við, at tá tað eydnaðist teimum at fáa eitt stig burturúr, tá teir høvdu so vánaligan hugburð til avbjóðingina, so kundi tað ikki fara at liggja heilt illa fyri í DM kappingini.

**jh**

# FCK nærkast toppinum

**Venjarin frøddist um, at tað bar til at vinna á Brøndby, sjálvt um lyklaspælararnir Ståle Solbakken og Todi Jónsson ikki vóru við**

Tað var óført lag á FCK monnunum sunnukvøldið. Niels Christian Holmstrøm mundi næstan havt gloymt illsinniglepsini eftir føroyska landsliðnum, tá hann, Flemming Østergaard og hinir høvdingarnir í FCK á Brøndby stadion sóu teirra menn fara við øllum og harvið taka eitt stórt fet ímóti toppinum í superliguni.

FCK vann 2–1, og tað høvdu teir uppiborið. Brøndby venjarin var ørkymlaður um avrikið hjá sínum monnum. Hann helt, at tað fór at verða trupult at vinna DM, um vend ikki kom í. Í vár hevur Brøndby tapt tvær ferðir á heimavølli.

Í FCK álopinum var Heine Fernandez saman við suðurafrikanaranum, Zuma. Myrki bóltsnillingurin var stóri maðurin hjá FCK. Verjuspælararnir hjá Brøndby sóu heilt gumpatungir út, tá væl upplagdi maðurin snurraði runt við teimum.

### Málini

Tað var kortini Thomas Thorninger, vongspælarin hjá FCK í vinstru, sum setti hol á. Tað gjørdi hann í 41. minutti, og talan var um eitt fínt mál, tá hann úr fimtan metrum fluktaði framvið Mogens Krog, veteraninum í málinum hjá Brøndby.

Men beint undan steðginum tóktist tað, sum at heimaliðið megnaði at fáa sína skútu á beint aftur. Sviin Mattis Jonsson fekk eftir klumpspæl bóltin framvið norska FCK leigusveininum, Thomas Myhre, og so var aftur javnt.

Í 2. hálvleiki legði Brøndby bragdligari fyri, og fyrstu tíggju minuttirnar áttu teir alt. Men so var tað, at Zuma tók søkina í egnar hendur og legði FCK framum aftur. Síðstu løtuna øktist trýstið á FCK málið alt meiri, men heimamenninir komu ikki nærri enn roynd í tvørtræið og niður í vøllin.

Komandi sunnudag fær Brøndby vitjan av oddaliðnum úr Silkeborg. Um Brøndby skal hugsa um DM, so verður neyðugt hjá teimum at vinna. Silkeborg skuldi í gjárkvøldið spæla ímóti Viborg, sum eisini telist ímillum liðini, ið stríðast um fremstu plássini og harvið um rættin til Europa Cup luttøku.

Eftir dystin skein Roy Hodgson, venjarin hjá FCK, sum sólin. Hann frøddist um úrslitið, stigini og at hansara lið hevði otað seg nærri oddinum. Hann segði seg frøðast serliga um, at FCK hevði megnað hetta, sjálvt um tveir av spælarunum, sum hava verið mettir sum stuðlar í royndini at klatra upp á tindin, ikki vóru tøkir.

Í hesum sambandi sipaði Hodgson til Ståle Solbakken og Toda Jónsson. Todi Jónsson var millum teir 25.000 áskoðararnar í Brøndby, og hann var sjálvandi ovurfegin um úrslitið. Todi er so smátt farin undir fyrireikingarnar at stríðast fyri at sleppa upp í part aftur. Tað verður roknað við, at hann kanska kann spæla um góðar tvær vikur.

Hjá Ståle Solbakken er tað meiri ivasamt. Eftir at hann fyri einari viku síðani varð útskrivaður, trein Ståle fríggjadagin fyrstu ferð alment fram. Hann hevði ikki annað ítøkiligt at siga, enn at tað um ein góðan mánað verður gjørt av, um hann eigur nakra framtíð á fótbóltsvøllinum ella ikki.

**jh**